# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Sofus Foldbo 75 ár



Leygardagin 29. oktober fyllir Sofus Foldbo í Leirvík 75 ár.

Sofus er føddur 29. oktober 1930 á Toftum, sonur Ingu og Óla Foldbo.

Sofus er, hóast hann er komin nakað upp í árini, enn sera virkin. Hann er egningarformaður hjá útróðrarbátinum Brandi, og í frítíðini er tað serliga seyður og føroyskur dansur, ið hevur hansara áhuga.

Annars hevur hann roynt eitt sindur av hvørjum. Var sum ungur eitt stutt skifti og arbeiddi á norskum bóndagarði, men var annars mest á sjónum til hann sum 45 ára gamal fór at arbeiða fast á landi. Hann var við til at gera Eysturoyartunnilin, Leynartunnilin, tunnlarnar í Kalsoynni og í Leirvík, tey nógvu árini sum arbeiðsformaður. Seinastu árini, til hann fór frá fyri aldur, hevði hann við viðlíkahaldið av vegunum í pørtum av Eysturoynni at gera.

Sum nevnt dámar honum væl føroyskan dans, og hann hevur í nógv ár verið formaður í Eysturoyar Dansifelagi. Tí skuldi tað ikki undra, tá hann nú leygarkvøldið heldur føðingardag í LÍF-húsinum, at farið verður upp á gólv.

Vit ynskja Sofusi tillukku við teimum 75 árunum.

**x.**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Peter Christian Johannesen**
Tórshavn
vanliga nevndur Petir hjá Fritleif

andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin
26. oktober, 79 ára gamal.
Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum
fríggjadagin kl. 18.00
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
leygardagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*

**Anna**
**Brynja, Gulbrit og Finnbogi v/fam.**

---

### 90 ár

Í dag, 28. oktober fyllur Margretha Mouritsen, vanliga nevnd Gigga, 90 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Jacob Johansen,** fyrrverandi gravari í Klaksvík, andaðist mánadagin á Norðoya røktarheimi, 89 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum heim í kirkjuni hóskvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr kirkjuni fríggjadagin klokkan 13.30. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Hans Jacob, kunnu lata Norðoya røktarheimi eina gávu. Konta í Norðoya Sparikassa.

**Arne Klein** av Skála andaðist 25. oktober, 88 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellin um hósdagin klokkan 17. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 14 úr Skála kirkju.

Tey, ið vilja minnast Arna kunnu lata eina gávu til Reyða Kross Føroya.

**Anna Nora Winther,** fødd Gray, búsitandi í Helsingør, andaðist týskvøldið 25. oktober, 61 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Stenhs kirke Vatnagaard, Helsingør, mánadagin 31. oktober klokkan 13.

**Peter Christian Johannesen,** vanliga nevndur Petir hjá Fritleif, úr Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 26. oktober, 79 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjakvøldið klokkan 18.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin klokkan 14.00.

---

**Dagurin**

**28. oktober. Tveggja ápostla messa,** Símun Selotes og Judas Taddeus. Søgnin sigur, at teir vórðu báðir dripnir í Persiu í árinum 71.

Á einum av kirkjubøstólunum sæst mynd av einum ápostli við gassa í hendi. Er helst annar av teimum, tí at søgnin sigur, at teir báðir vórðu bardir til deyða.

---




**HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ**
Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin

"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo




# Móttøka

Í sambandi við at vit flyta úr
Tannlæknastovuni í Brekkugøtu 8
í nýggju Tannlæknastovuna í Dalatúni 19
hava vit mótøku fyri
okkara viðskiftafólkum, starvsfelagum, vinum og kenningum
og annars øllum sum hava havt við nýbygningin at gera
fríggjadagin 28. oktober, frá klokkan 15 til 17.

Marnar Gaard · Ísak Thomassen · Regin Eikhólm